# stina



situr við einum málningi, ið fekk eina rivu í



*Tá SMS verður liðugt umbygt, kemur ein 11 metur høg útgáva av hesi glassúluni at standa miðskeiðis í húsinum*



*Tróndur Patursson við eini smámyndaútgávu av øðrum málningunum, hann skal gera til Føroyarúmið í Fólkatinginum*





*Tekningar eftir Claus Seidel, blaðteknara*

Samstundis viðgongur hann, at honum nettup dámar væl at mála til høli, har fólk kanska minst av øllum vænta at síggja list. Ein tann fyrsta uppgávan av hesum slag var glaslistaverkið hjá Trónda í einum parkeringshúsi í Vejle, sum hann eisini varð virðislóntur fyri.

- Eg vil fegin náa út til ta breiðu fjøldina við míni list, og til tað hóska listaskálar ikki altíð best, tí har kemur mest sama slag av fólki, sigur Tróndur.

Hetta var eisini ein av orsøkunum til, at hann var glaður við boðið um at gera eitt ljóslistaverk í Norðoyatunlinum.

- Tað var ein spennandi uppgáva, tí har skuldi eg arbeiða frá myrkri til ljós. Eisini er ein tunnil jú fullur av trøllum, sum næstan verða livandi, tá ljós og litir raka serliga skapið í grótinum. Ljósrørslurnar geva kanska eisini eina kenslu av at vera á havsins botni, greiðir Tróndur frá.

Hann heldur tað vera sera stuttligt, at Norðoyatunnilin nú gjørdist eitt av teimum sjey føroysku undurverkunum - ikki at hann sjálvur ætlar at taka æruna fyri tað. Men mong munnu kortini vera samd um, at valið hevði nakað við serstaka listaverkið at gera.

## Hyggur Picasso í eyguni

Spurdur um tað ikki kennist ræðandi onkuntíð at átaka sær so stórar uppgávur, sum hann hevur gjørt gjøgnum árini, sigur Tróndur, at tú venur teg við tað.

- Eg geri mítt besta og syrgi fyri, at eg kann standa inni fyri tí. Eg havi altíð tikið mítt arbeiði í stórum álvara, syrgt fyri at útbúgvi meg og roynt at mennast, sigur Tróndur, meðan tankarnir leita til ein lærara, hann hevði á listakademiinum í síni tíð.

- Eg gloymi ongantíð, tá hann einaferð segði við meg: Tróndur, minst til, at tað tekur í minsta lagi 20 ár at finna sín egna listarliga stíl. Fyrsta kravið er, at tú tekur tína list í álvara og finnur hana innan í tær sjálvum, minnist Tróndur.

- Hvussu tað er eydnast, mugu onnur døma um. Eg eri í hvussu er komin har til, at eg kann hyggja bæði Rubens og Picasso í eyguni og siga:

Jú, eg meini tað í álvara.